## Daewoo Evanda



Avloysarin fyri Daewoo Laganza, Evanda, kemur á evropeiska marknaðin í vár. Bilurin, ið er 10 cm longri enn Leganza, er designaður á italiensku teknistovuni, ItalDesign.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai og Kia



Koreansku bilverksmiðjurnar Hyundai og Kia hava bygt eina stóra designmiðstøð í Irvine í California, ið skal samstarva við teirra egnu designmiðstøðir í Korea og Evropa um framtíðar bilmodellini.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mercedes E stationcar



Ein nýggjur Mercedes E stationcar kemur á danska marknaðin í mars. Bíligasta útgávan kostar yvir 800.000 krónur í Danmark

*Kelda: Motor Magasinet*

# Nissan Micra – bilurin uttan startlykil



*Í sambandi við at nýggi Nissan Micra er komin á marknaðin, var opið hús hjá P/F Meinhardt Arge seinasta leygardag. Jan Hentze, sølumaður, sýnir her nýggja bilin fram*

**Við nýggja Nissan Micra ber til at læsa bilin upp og koyra avstað uttan at taka billyklarnar úr lummanun. Bilurin er ein blandingur av japanskum og fronskum designi og koyrieginleikum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nissan Micra er fyrsta úrslitið av samstarvinum millum Renault og Nissan. Navnið er tað einasta, ið nýggi Nissan Micra hevur til felags við forgangaran. Hóast bilurin er 4 cm styttri enn forgangarin, er hann bæði hægri og breiðari, og harvið verður meira pláss í kabinuni. Baksetrið kann flytast 20 cm aftur og fram, soleiðis at setrið kann koyrast aftur fyri at fáa betri beinpláss og fram fyri at fáa størri viðførisrúm. Viðførisrúmið kann varierað frá 251 til 371 litrar. Micra hevur nýggja "Keyless-Go"systemið, har bilførarin uttan at taka lykilin úr lummanum kann læsa seg inn í bilin, starta motorin og koyra avstað. Eisini hevur bilurin "battarísikring" sum tryggjar at ljósið inni í bilinum søknar eftir 10 min. ella 2 tímum, alt eftir hvat tað er stillað til. Hetta er fyri at tryggja, at bilurin ikki stendur uttan streym, um eigarin gloymir at sløkkja ljósini. Forlyktirnar sita ovarlaga á forskermunum og toppurin á lyktunum sæst undir koyring í myrkri.

### Prísir frá kr.129.000

Micra fæst við 1.2 litur bensinmotorum við ávikavist 65 og 80 hk og einum 1.4 litur bensinmotori við 88 hk. 1.5 litur dieselmotorum hevur 65 hk. Standardútgerðin er m.a. ABS bremsur við EBD (Elektroniskum Bremsukraft Deilara) og NBA (Nissan Brake Assist), elektroniska ferðreguleraða servostýring, airbag framman, í síðunum og airbag gardinur í loftinum, aktivar nakkapútur, Anti-dyk forsetur og "Kom gott heim" forlyktir, sum lýsa eina løtu eftir, at bilførarin hevur sett bilin frá sær. Tað merkist at Micra er gjørdur í samstarvi við Renault, tí bilurin er ein blandingur av japanskum og fronskum designi og koyrieginleikum. Designið er sermerkt, serliga framman, við lyktunum oman á skermunum. Micra verður gjørdur við trimum og fimm hurðum. Prísirnir byrja við kr. 129.000 fyri ein við 1.2 litur motori við 65 hk og trimum hurðum. Bilurin verður framleiddur á Nissan bilverksmiðjuni í Sunderland í Onglandi.



*Micra innan. Við "Keyless-Go" systeminum kann bilførarin, uttan at taka bilkykilin úr lummanum, læsa seg inn í bilin, starta motorin og koyra avstað*



*Designið er ein blandingur av fronskum og japanskum stíli. Bilurin hevur stóra bakljúku, og viðførisrúmið kann gerast størri við at flyta baksetrið fram*

## Nissan Micra 1.2 Visia 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1.2 litur 4 syl. bensin 80 hk |
| 0-100 km/t: | 13,9 sek |
| Bensinnýtsla: | 16,9 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 165/70-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 371,5 cm |
| Breidd: | 166,0 cm |
| Hædd: | 154,0 cm |
| Eginvekt: | 975 kg |
| Totalvekt: | 1475 kg |
| Viðførisrúm: | 251-371 litrar |
| Prísur: | kr. 142.000,- |
| Søluumboð: | P/F Meinhardt Arge<br>v.Oyggjarvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.nissan.fo |






FORD ESCORT 1.8 DIESEL
Árg 96, Km 154.000. Kr. 55.000

FORD ESCORT 1.3I CLX
Árg 97, Km 85.000. Kr. 50.000.



FORD TRANSIT 2.5 DIESEL
Árg 96, Km 102.000. Kr. 85.000.



FORD ESCORT 1.8 TD
Árg 97, Km 137.000. Kr. 70.000.



FORD ESCORT 1.8 DIESEL
Árg 95, Km 171.000. Kr. 50.000.



FORD FOCUS 1.6I GHIA
Árg 99, Km 56.000. Kr. 134.000.



FORD FOCUS 1.6I GHIA
Árg 99, Km 62.000. Kr. 134.000.



FORD FOCUS 1.8 TDI
Árg 99, Km 69.000. Kr. 142.000.



CITROEN XARA 2.0 HDI
Árg 2001, Km 26.000. Kr. 160.000.

TOYOTA CARINA E 1.6 XLI
Árg 92, Km 202.000. Kr. 55.000.

MITSHUBITSHI GALANT 1.8
Árg 89, Km 250.000. Kr. 30.000.



FORD ESCORT 1.8 TURBO DIESEL
Árg 97, Km 127.000. Kr. 78.000.

FORD ESCORT 1.8 DIESEL STW
Árg 96, Km 52.000. Kr. 65.000.

FORD FOCUS 1.6I GHIA
Árg 2000, Km 57.000. Kr. 148.000

Vit lata 20% í avslátri um ongin bilur er í byti

Ford P/f Wenzel
AKRANESGØTA 5 TEL 313873 FAX 311173
www.wenzel.fo

www.sosialurin.fo


# Málið er at geva eina sterka uppliving

TÍÐINDASKRIV FRÁ RFF
*Magnus Gunnarsson*



*Jákup Thomasen í Sørvági, ið er lamin eftir eina ferðsluvanlukku, greiðir skúlanæmingum frá avleiðingunum av ferðsluvanlukkum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í samstarvi við politiið, ambulansutænastuna á Landssjúkrahúsinum, koyrilærarar og ferðsluoffur, skipar Ferðslutrygd fyri dagskeiðum fyri 9. flokkar í Føroyum um evnið »ferðsla og ungdómur«

Endamálið við dagsskeiðinum sum Ferðslutrygd skipar fyri er at fáa næmingin at skilja, hvussu nær vandanum hann í veruleikanum er tá hann ferðast í ferðsluni, og at tað ikki bara eru "hini", sum kunnu koma út fyri álvarsligum ferðsluvanlukkum. Hetta verður m.a. gjørt, við at fólk, ið hava upplivað ferðsluvanlukku, greiða frá úr egnum barmi. Eisini verður við filmum og myndum roynt at lýsa, hvussu ógvusliga náttúrukreftirnar leika í, tá ið illa vil til. Aldursbólkurin 15 til 24 ár umboðar einans 18% av fólkatalinum, men eigur 40% av teimum, sum hava fingið ringastu skaðarnar í ferðsluvanlukkum. Hagtølini prógva, at hóast tey í aldursbólkinum 15 til 17 ár ikki koyra bil sjálvi, eru tey í eins stórum vanda at koma í álvarsliga ferðslu-vanlukku, sum tey ið hava aldurin til koyrikort. Og hetta er ein orsøkunum til, at Ferðslutrygd leggur doyðin á at gera upplýsingararbeiði millum ung.

### Avleiðingarnar í brennidepilin

At 9. flokkur er valdur sum málbólkur, er tí, at hetta er seinasta høvið at hitta ein heilan árgang á máli í senn í fólkaskúlanum - í 10. flokki byrja næmingarnir jú at fara hvør í sína ætt. Í 9. flokki eru bara 2-3 ár eftir, til koyrikortið skal takast, og tí er upplýsing um ferðsluvandar millum ung sera viðkomandi fyri henda aldursbólk.

Á dagsskeiðinum er ikki ætlanin at nýta moralska fremstafingurin. Heldur verður roynt at seta avleiðingarnar av ferðsluvanlukkum í brennidepilin: tað dýrabara, óskadda í mun til tað brotna og syndraða, - hitt ljósa og vónríka unga sinnið í mun til tað døkka og vónbrotna. Roynt verður ikki einans at tala til vit og skil, men eisini til kenslurnar. "Málið er at geva eina sterka uppliving, sum setur seg í mergin, og á henda hátt at ávirka hugburðin tann rætta vegin", sigur Jón Kragesten, leiðari á Ferðslutrygd.


Føstulávintsklipp á Býarbókasavninum



Vit klippa grýluskortar á barnabókasavninum hósdagin 27. februar kl. 10

Børn upp til skúlaaldur

Minnist til at hava saks við



Býarbókasavnið
Tlf. 31 36 26

Hvat virði hevur tín gamli bilur? ...nóg mikið til ein nýggjan?

Daewoo Tacuma frá kr. 1.675,- pr. mðr.



Hesa vikuna er rættuliga nógvur peningur at spara við keyp av einum nýggjum Daewoo!
Vit geva óvanliga góðan prís fyri tín brúkta bil, ella eisini óvanliga góðan avsláttur, um eingin bilur er í býti.
Støkk inn á gólvið og fá sjón fyri søgn, hvussu tú gerst væl koyrandi uttan at seta tað fíggjarliga yvir stýr.

DAEWOO - ein skilagóð avgerð!

ES P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29